LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

VW GOLF III TD 1,9
árg. 92, við nýggjum motori, koyrt 4.000 km, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 375186 - 222893

TIL SØLU
Fýra alufelgur v/ 4 holum, 100 mm v/ dekkum, 195/50-75, lítið brúkt, til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 223370 ella 311598, e. kl. 17

MOTORUR
til Mazda 323 1,3 til sølu.
Tlf. 252072

HONDA ACCORD
frá nov. 95, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 455862

MAZDA 323,, 1300
Árg. '85, koyrir væl, til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 224594

TIL SØLU
Vælhildin opel Astra l stationcar, reyður, til sølu. Árg.10/97. Koyrt 33.500 km.
Telefon 457226

NISSAN PRIMERA 1.6i
árg. 10/94, hevur sportfelgur, er sera økonomiskur, væl hildin, til sølu.
Tlf. 447435

TIL SØLU
Mercedes 280 SE biliga til sølu.
Tlf. 261538

MAZDA 6216 GLX 2.0
Hatchback, árg. 84, automatgear, koyrt 122.000 km. Krevur ymiskar ábøtur. Hevur nýggjari bensintanga, svingarmar, akkumulator o.m.a. Prísuppskot: 6.000 kr.
Tlf. 316392

SUMMARDEKK
Fýra næstan nýggj summardekk, 185x60-14, til sølu.
Tlf. 374210, e. kl. 17

MAZDA 323
árg. 89, við skaða, til sølu.
Tlf. 223508 / 442192

DAEWOO
Ein grønur Daewoo Nubira st.car til sølu, koyrt 25.000 km, fýra summarfekk á felgum fylgja við.
Tlf. 258052 ella 451024

SKODA FABIA
frá apríl 2001 til sølu vegna flyting.
Tlf. 217368

TIL SØLU
Suzuki Swift, árg. 88, bert koyrt 44.000 km., í góðum standi. Nýsýnaður. Ongan kross. Til sølu fyri 16.000 kr.
Tlf. 310735 ella 214601

TOYOTA CARINA II
Árg. 1986, til sølu. Koyrir væl, men treingir til ábøtur, kann eisini brúkast sum eykalutir.
Ring 218744

OPEL ASTRA ST. CAR
til sølu. 1.7 diesel, 8/95, 132.000 km. Hevur sleipikrók, sær gott út. Hevur sportfelgur. Fýra dekk á felgum fylgja við.
Tlf. 283948

VW GOLF
árg. 88, 160.000 km, nýsýnaður og nýlakeraður.
Tlf. 250335

SUZUKI ALTO
frá juli 1999 til sølu, koyrt 43.000 km.
Tlf. 320140

RENAULT MEGANÉ COUPÉ
Ein grønur Renault Megané Coupé, 1600 e, árg. 1996 verður seldur um hóskandi boð fæst.
Tlf. 251096

VW GOLF GL
diesel, árg. 1991, í góðum standi til sølu.
Tlf. 447827

HYUNDAI GALLOPER
árg. 99, koyrt 60.000 km. Bilurin hevur sjey sitipláss og sær gott út, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 250440

OPEL KADETT 2.0 GSI
Svartur, koyrt 177.000 km, biliga til sølu.
Tlf. 215414

OPEL KADETT E3
diesel, bíliga til sølu. Áhugaði kunnu ringja millum kl. 12-13 á
tlf. 455861

TOYOTA CAMRY 2.2
aut., árg. 95, km 65.000, nýsýnaður og nýlakeraður.
Tlf. 320606 ella 223993

COROLLA TIL SØLU
árg. 91, 3d, bilurin er nýsýnaður og sær sera gott út í lakkinum, hevur 15" alufelgur við nýggjum dekkum.
Tlf. 220004

MAZDA 323
árg. 88 biliga til sølu.
Tlf. 361807

MITSUBISHI PAJERO
Mitsubishi Pajero, árg. 89.
Tlf. 215308

TIL SØLU
Galesja – glasfipurkápa til vøruvogn – 150 cm. breið og 192 cm. long.
Tlf. 422522

SUZUKI SJ 413
4 x 4, árg. 1987, hevur ongar plátur, men er í góðum standi.
Tlf. 422522

PEUGEOT 206 XT
til sølu, árg. 2000. Hann hevur koyrt 13000 km. Ring á
tlf. 251090 e. kl. 17

TIL SØLU
Opel Vecka 17 TD, árg. 11/96, til sølu. Bilurin hevur koyrt uml. 96.000 km, hevur sportsfelgur, er vælhildin.
Tlf. 217790, e. arbeiðstíð

CITROEN XANTIA 2.0 HDI
árg. 2000 v/ nógvari eykaútgerð, el-rútar, servostýring, sentrallás, hita í setrinum, auto airkonditión, regnsensor. Teldustýrt fjaðrasystem, 15" alufelgur + pikadekk á felgum og nógv annað til sølu.
Tlf. 449934 ella 226776

TOYOTA HIACE
vøruvognur, árg. 89, til sølu.
Tlf. 447487

HYGG HER!
Ein Peugeot 306 TD, frá 8/97, koyrt 112.000 km, til sølu.
Tlf. 213790

VW GOLF GTI 16V
árg. 87, góður sum eykalutir, til sølu fyri 5.000 kr.
Tlf. 227551

MAZDA 626
árg. 86, til sølu fyri 4.000 kr. Hevur plátur.
Tlf. 211641

TIL SØLU
VW Golf III GTD Special turbo diesel, árg. 92, svartur/lilla, Azev sportsfelgur, til sølu um hóskandi boð fæst, ella í umbýti við ein størri bil.
Tlf. 219022 - 223920

MAZDA 2,0 l
árg. 09/86, sýnaður 18. juli 2001, til sølu fyri 12.000 kr. Hevur sportsfelgur við nýggjum dekkum. Koyrir væl og sær gott út.
Tlf. 255459

TIL SØLU
Opel Corsa, árg. 89, til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 257111

BILUR TIL SØLU
Ein hvítur Toyota Corolla 1300 XLI -KAT til sølu. Bilurin er frá 90, og hevur koyrt 237.000 km.
Tlf. 261333

NISSAN CABSTAR
til sølu sum eykalutir. Góð dekk.
Tlf. 213046

NISSAN BLUEBIRD
til sølu.
Tlf. 361379, Turid

YMISKIR EYKALUTIR
til Ford Scorpio 2,0iGl, árg. 86, bíliga til sølu. T.d. motorhjelmur, motorur, aut. gearkassi, komplett ABS, hurðar í vinstru síðu, stoytdoyvarar til baklúku, el-rútavindarar og ymiskt annað.
Ring 217501

Amboð

TIL SØLU
Rema snikkaramaskina til sølu.
Tlf. 314959

TIL SØLU
Brúkt Hunnebeck »let form« forskalling, 250x75 cm, 130 fermetrar.
Kaj Andreasen & Co., Tlf. 315600

Arbeiði

REINGERÐARHJÁLP
Álítandi og húslig kvinna søkist 4 tímar um vikuna.
Tlf. 316741, e. kl. 18

ARBEIÐI SØKIST
Maður í 30-unum søkir eftir arbeiði, hevur koyrikort. Alt hevur áhuga. Helst 10-14 tímar um dagin.
Tlf. 261538

ROYNDUR TRAILARASJAUFØRUR
ynskir arbeiði. Yvirtíð eingin forðing.
Tlf. 318892 ella 254478

H.S.-SMÍÐ
Alt timburarbeiði verður gjørt.
Tlf. 318892 ella 254478

ARBEIÐI SØKIST
21 ára gomul genta søkir kvøldarbeiði í Havn. Hevur royndir innan m.a. handil.
Vinarliga ring á tlf: 261586

ELEKTRIKARI
søkir arbeiði í Suðuroy. Vinarliga ring aftaná kl. 17.00.
Tlf. 312027/214344

ARBEJDE SØGES
Lettere indendørs flisearbejde.
Tlf. 314434

ALT FYRIFALLANDI
arbeiði verður gjørt av tilkomnum handverkara.
Tlf. 310352

ARBEIÐI SØKIST
Pensionist søger arbejde, bl.a. havearbejde og mindre indedørs flisearbejde.
Tlf. 228058

HÚSASMÍÐ OG UMVÆLING
Alt timburarbeiði verður gjørt, nýtt sum gamalt innan og uttan. Fa. Húsaumvæling,
tlf. 215214

Barnaansing

GENTA/KVINNA SØKIST
18 ár ella eldri, at heinta 6 ára gamlan drong í barnagarði kl. 16.30 og ansa eftir honum til kl. 19.30 aðru hvørja viku og annaðhvørt vikuskifti kl. 8–15.
Tlf. 310171 - 252610

Barnaútgerð

TIL SØLU
Vælhildin myrkabláur/beige ternutur barnavognur v/ lift og pusslitasku av sama merki, fluguneti og regnslagi, til sølu fyri 3.500 kr. Nýprísur 6.000 kr.
Tlf. 310323 ella 251223

YNSKIST
Er nakar, sum eigur ein hokus-pokus stól at selja mær, so ring
Tlf. 258402

SKANDI
barnavognur til sølu.
Tlf. 375298

BARNAVOGNUR
Lítið brúktur av slagnum Silver Cross til sølu fyri 3.500 kr. Sær út sum nýggjur.
Tlf. 253062

BARNAVOGNUR TIL SØLU
Bláur mynstrutur kombivognur við babylyft til sølu fyri 1200 kr.
Tlf. 328138

TIL SØLU
Babylyft við tasku – óbrúkt – selist fyri 250 kr.
Tlf. 220272 ella 316036 um kvøldið

BARNAVOGNUR
6 mðr. gamal barnavognur og stólur, myrkabláur og hvítur, til sølu fyri 2.800 kr., eru lítið brúktir. Flugunet og regnslag fylgja við. Nýprísur 4.800 kr.
Tlf. 448595 ella 263401

TVÍBURAKOYRISTÓLUR
/kombivognur við galesju og tveimum lyftum til sølu fyri einans 1.000 kr. Nýprísur 6.000 kr.
Tlf. 227430

BARNASONG
Hvít við stiga, skáp og skrivaraborð undir, til sølu fyri uml. 700 kr.
Tlf. 317218 / 210218

TIL SØLU
Koyristólur og rimasong til sølu.
Tlf. 448417

Bátaútgerð

MARNA DIESEL
36 HK, til sølu.
Tlf. 218195 - 4448195

TIL SØLU
Ein Møn Fisherman, 30 fót, til sølu, um hóskandi boð fæst.
Tlf. 220632 ella 441035

TIL SØLU
Línuspæl til sølu.
Tlf. 441309 ella 441412

SEKSÆRINGUR
Hevur nakar ein til sølu sum er klárur til fiskiskap, so ring
tlf. 222774

TIL SØLU
Furuno ekkolodd LS-6000.
Tlf. 223508 / 442192

SNELLUR YNSKJAST
Automatiskar snellur ynskjast til keyps. Helst Vágasnellur.
Tlf. 448245 ella 254842

SEKSÆRINGUR
Hevur nakar ein seksæring til sølu, sum er klárur til fiskiskap, so ring
tlf. 222774

MOTORUR TIL SØLU
Brúktur Buck 30 HK motorur biliga til sølu.
Tlf. 312954

GEAR TIL SØLU
Borg Warner oljutrýst-gear 2.57 x 1 til sølu.
Tlf. 227989

10-MANNAFAR
við 5D fiskiloyvi upp til 15 tons, til sølu.
Tlf. 223492

GPS 315 MAGELLAN
Nýggjur, lítið brúktur berbarur GPS'ari til sølu fyri 1.800 kr.
Tlf. 227573

Bingo

FRÁ EYDNUNI
Gott bingo verður sunnudagin 20. jan. kl. 16.00. Full pláta 400 kr. Høvuðsvinningur á lutaseðli 1.000 kr. Eykaspælið 800 kr. Drigið verður millum spølini.
Eydnan

BINGO
Gott bingo verður í TB-húsinum tórsdagin 17. januar kl. 19.00. Høvuðsvinningur 2 x 500 kr. Hvørt bingo 300 kr. Eykaspæl verður eisini.
Tvøroyrar Bóltfelag

FRÁ GLÆMUNI
Gott bingo verður í Glæmuni í Kvívík mikukvøldið 16. januar kl. 19. Full pláta 300 kr. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

Brævaskifti

BURTURMIST
Eitt Seiko damu gull ur burturmist í Havn, møguliga í SMS 20. des. ella á Kongabrúnni. Finningarløn verður givin.
Tlf. 313763

Burturm. /funnið

BURTURMIST
Lyklaringur við tveimum lyklum burturmist nýggjársaftan á strekkinum Krossgøta-Gálgasteinur. Hevur nakar funnið lyklarnar, vinarliga ring
Tlf. 311242

BURTURMIST
Playstation 2 spæl »Fifa 2002« burturmist uttan fyri SMS (Apotekið) 28. des. Tann, ið hevur funnið spælið, vinarliga ring
Tlf. 317299 ella 257972

FARTELEFON BURTURMIST
Blá Nokia 3210 fartelefon burturmist 29.12 uppi á Nabb. Hevur tú funnið hesa, vinarliga ring
tlf. 423270

TÚ,
ið av misgáum hevur tikið Lewi's kovboyjakkan hjá mær í TB-húsinum 2. jólakvøld, verður vinarliga biðin um at ringja
tlf. 371723 ella 224899

Býli

KAMAR TIL LEIGU
frá 1. febr. Atgongd til køk og bað. Til fólk, ið ikki roykir.
Tlf. 22390114

YNSKIST TIL LEIGU
Hús í Havn ella nærhendis ynskjast bíliga til leigu. Mugu helst hava fýra kømur.
Tlf. 224864 - 281546

ÍBÚÐ YNSKIST
Mamma við tveimum børnum ynskir íbúð í Havn skjótast gjørligt.
Tlf. 210802

HÚS TIL LEIGU
Nýggj vælhildin hús til leigu miðskeiðis í Tórshavn. Húsini kunnu leigast heilt ella partvíst møbulerað. Húsini verða einans útleigað til fólk, ið fara væl um. Nærri fæst at vita við at ringja
Tlf. 210022

HÚS Á TORVHEYGGI
í Froðba til sølu. Stødd 115 kvm. Grundøkið 2.000 kvm.
Tlf. 371461

ÍBÚÐ YNSKIST
Vit eru eitt ungt par, ið ynskja íbúð til leigu í Havn skjótast gjørligt. Vit fara væl um.
Tlf. 221151, e. kl. 18

TIL SØLU
Hugnaligt summarhús í Gedesby. Stova, havastova, 2 kømur, køkur, baðirúm, 2 terrassir, arbeiðsrúm og skúr. Avbyrgdur, stórur og vælhildin havi (1210 fermetrar). Um 500 metrar frá eini av bestu strondunum í Danmark. Krónur 315.000.
E-mail: datofx@hotmail.com

TIL LEIGU
Hús/íbúð (60 fermetrar) í Havn, nær Kongabrúnni, til leigu fyri 4.750 krónur + ljós og hita. 2 kømur, stova og køkur.
Teldupostur: morn68@hotmail.com

YNSKIST
Stór íbúð ella hús ynskist (min. 4 kømur) í Havn ella á Argjum. Gjalda altíð til tíðina. Vilja flyta inn sum skjótast.
Tlf. 212795 ella 258699 eftir kl. 15

ÍBÚÐ YNSKIST Í ÁRHUS
Íbúð ynskist til leigu í Árhus, helst Árhus C, skjótast gjørligt. Vinarliga ring á
tlf. 218317

KAMAR TIL LEIGU Í DK
Kamar á Nørrebro – 12 kvm. – til leigu fyri 2.700 kr. um mánaðin frá 1. febr.
Bill.mrk. 1256-1

ÍBÚÐ YNSKIST
Maður fyrst í 30'unum søkir eftir íbúð ella stórum kamari í Havn ella nærhendis skjótast gjørligt.
James tlf. 228063

KAMAR
v/ atgongd til køk, stovu, vaskirúm og baðirúm til leigu til ikki roykjara.
Tlf. 317425

KAMAR Í KBH.
til leigu til kvinnu, sum er stillfør, húslig og ikki roykir. Áhugað ringið 319960, 219960, 004538117350 ella
004528922575

TIL LEIGU
Hús eru til leigu í Miðvági.
Tlf. 314845 ella 214845

HÚS YNSKJAST
til keyps á Tvøroyri. Vinarliga ring aftaná kl. 17.
tlf. 312027 ella 214344

ÍBÚÐ YNSKIST Í KBH.
Friðarlig, tilkomin kvinna ynskir íbúð til leigu í Kbh. í longri tíðarskeið.
Tlf. 75528154

ÍBÚÐ/KAMAR SØKIST Í HAVN
28 ára gamal maður, roykir og drekkur ikki, ynskir íbúð ella kamar til leigu beinanvegin fyri sámuligan prís.
Tlf. 315792

DUPULTHÚS TIL LEIGU
Húsini eru sera væl hildin og í tveimum hæddum við sera góðum útsýni yvir Havnina, adressan er Skørugøta 5. 1. hædd: stórur gangur/ bryggers/ tvey verilsir/ stórt baðiverilsi við brúsu/ baðikari og stórum klædnarúmi inni í baðiverilsinum, har hiti er í gólvinum. 2. hædd: hjúnarúm/wc/ góður køkur og stór stova/altan og ovastaloft. Húsini eru til leigu frá 1.02.2002. Hevur hetta áhuga, so set nakrar reglur um teg/tykkum og send til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn,
Bill. mrk. 534

ÍBÚÐ YNSKIST
Vit eru tvey, sum ynskja eina íbúð í Havn. Vit eru friðalig og fara væl um. Tlf 210644 ella 243003
e-mail: pr@formula.fo

HÚS YNSKJAST
til leigu, helst frá 1. mars 2002. Skal hava 4 kømur, prísuppskot 8.000,- um mðr. v/ ljósi og hita.
Tlf. 224441 el. 226750

Dansur

SUÐUROYINGAR
Føroyskur dansur fyri børn hvørt mánakvøld kl. 19-20 í dansistovuni í Trongisvági. Øll eru vælkomin.
Suðuroyar norðara dansifelag

Dýr

KETTLINGUR FUNNIN
Hvít og gráflekkutur kettlingur funnin við Íslandsvegin. Kann heintast Oman Mattalág 11.
Tlf. 258182

KETTA
Hvít hálvvaksin ketta við gráum hala og gráum um eyguni er burturblivin hin 9. jan á middegi. Hon býr á Landavegnum. Vinarliga ringið til 320300 um tit vita hvar vit finna hana.
320300

HUNDAHVØLPAR
Sera fittir hvølpar kunnu latast til dýravin um hálvan februar. Hvølparnir eru undan sera fittari tík.
Tlf. 442122 eftir kl. 17

TIL SØLU
Tveir tarvs- og tveir kvígukálvar til sølu.
Tlf. 318022, Syðradalur

KETTA HORVIN Í MIÐBÝNUM
Er ketta okkara yvirkoyrd, hevði verið gott at fingið vissu fyri hesum. Seinast sædd 3. jólakvøld. Sjáldsama vøkur – hvít við svørtum blettum. Hevur onkur ta fatan, at hon er vilst, so vinarliga sig okkum frá á
tlf. 313275, Tróndargøta 6

LABRADOR HVØLPAR
Tveir ektaðir Labrador hvølpar til sølu, ein brún tík og ein svart. Kunnu latast beinanvegin – prísur 3.000 kr.
Tlf. 333372 ella 210372

DVØRGAKANINIR TIL SØLU
Julia - tað er mamman - hevur lagt nakrar forferdiliga fittar ungar. Fyri bara kr. 50,- kanst tú ogna tær ein.
Ring 21 13 24 og spyr eftir Rannvá

KETTLINGAR
Vit eru tveir sera fittir kettlingar ið verða latnir djóravini.
Tlf. 443287 ella 220952

KANINIR
Vaksnar kaninir kunnu avheintast ókeypis.
Tlf. 441675

TIL SØLU
Akvarium, 60x25x25 cm, til sølu fyri 100 kr.
Tlf. 315792

FRENSUR BURTURBLIVIN
15. des. Hann er grá/svartur stríputur, hvítur um trýnið, eisini »brúnligur« um búk og hals, svartur undir labbunum. Er spakur og kelin. Veit nakar um hann at siga, so ringið endiliga tlf. 422515, 213839
Fax 422315

Fundir

FRÁ EYDNUNI
Ársaðalfundur verður 27. januar kl. 17. Skrá sambæmt lógini.
Ungmannafelagið Eydnan

JÓMSVÍKINGAR
Aðalfundur felagsins verður í Jómsborg leygarkvøldið 26. jan. kl. 20. Skrá sambæmt lógum felagsins. Eisini skal avgerast um sølu burturav ognum felagsins.
Nevndin

PENSIONISTAFELAGIÐ Í HAVN
hevur bingo mikukvøldið 16. januar kl. 18 í Losjuni, Tinghúsvegur 18.
Nevndin

ÁRSAÐALFUNDURIN
hjá Vágs Svimjifelag verður í Auluni í Vágs skúla 26. jan. kl. 20.00. Allir limir verða bindir um at møta.
Vágs Svimjifelag

Húsarhaldstól

CANDY VASKIMASKINA
til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 319747 ella 261083

KØLISKÁP
Lítið brúkt køliskáp við innbygdum frystara til sølu fyri 900 kr.
Tlf. 318625 ella 226270

KOMFÝRUR YNSKIST
Er tað nakar, ið vil selja okkum ein biligan komfýr?
Ring 260829 ella 223194 e. kl. 16

KOMFÝRUR
Nýggjur óbrúktur komfýrur 50 cm. breiður og ein emhetta 60 cm. breið, til sølu.
Tlf. 310215

BÍLIGA TIL SØLU
AEG komfýrur, 60 cm breiður. Gram køliskáp, 55 cm breitt og 100 cm høgt.
Tlf. 314213 ella 315622

Innbúgv

HVÍTT SKRIVARABORÐ
120x60, við tveimum skuffum, til sølu.
Tlf. 315888

MARMORBORÐ
Hvítt/svart marmorborð til sølu fyri 400 kr. L. 140, b 80, h 72. Lítið ljóst sofaborð, l 90, b 55, h 50 til sølu fyri 100 kr.
Tlf. 315991

TIL SØLU
Sofasett 3+2+1 og tvey borð til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 361807 ella 252895

KOSMETOLOGÚTGERÐ
Ymisk vælhildin kosmetologútgerð til sølu.
Tlf. 319182 ella 310300

TIL SØLU
Ljósabrúnt sofasett, brúnt sofaborð, dupult sovisofa, runt spisiborð v/ plátu til sølu.
Tlf. 314538

SPEGL ELIMENT
til baðirúm, 80x75 cm, til sølu fyri 250 kr.
Tlf. 315792

TIL SØLU
Gott sofasett 3+1+1 við brúnum sofaborði til sølu.
Tlf. 444106

KRYSTALGLØS TIL SØLU
Kirsten Piil krystallgløs fra Holmegaard Glasverk til sølu: 6 ølgløs á kr. 95. 2 reyðvin á kr. 95. 5 likør á kr. 80. 4 snaps á kr. 70. 2 portvín á kr. 70. 3 dessert á kr. 95. Øll sum nýggj, fáast ikki til keyps í handlinum.
Tlf. 321575 aftana kl. 17

Lutaseðlar

MIÐVÁGS RÓÐRARFELAG
Lutaselarnir, sum vórðu drignir á Sølustevnuni hjá Miðvágs Róðrarfelag 25 nov., eru ikki avheintaðir enn: ein apex ferðaseðil, við ATLANTIC AIRWAYS hevur nr. 948 og ein kassi av sodavatni nr. 730 . Eru vinningarnir ikki avheintaðir áðrenn 30 jan., fella teir aftur til felagið.
Miðvágs Róðrarfelag

Matur

TIL SØLU
Ein kaggi av saltgrind og spiki til sølu.
Tlf. 361047

Pløgg

BRÚÐARKJÓLI
Sera vakur, ráhvítur brúðarkjóli, std. 42, undirskjúrt, sjall og skógvar fylgir við, til sølu fyri 4.000 kr. Nýprísur 7.000 kr.
Tlf. 227430

TIL SØLU
Kópaskinns pelsur, str. 38.
Tlf. 448417

Sjavs

SJAVSKAPPING
Almenn sjavskapping verður á Kafé Blákross týsdagin 15. januar kl. 19.00.
Kafé Blákross

Súkklur

SÚKKLUR
til sølu vegna plásstrot: Ein 3 ára gomul, lítið brúkt damusúkkla fyri 1.700 kr. og ein lítið brúkt, 2 ára gomul barnasúkkla til 9-11 ár fyri 600 kr.
Tlf. 313404 - 317795

KAPPSÚKKLA
Kappsúkkla ynskist.
Tlf. 441546

BRÚKTUR SKUTARI
í prísklassanum 4-6.000 kr. ynskist til keyps.
Tlf. 223618 ella 311819

TIL SØLU
Barnasúkkla 4-7 ár, lítið og onki brúkt, selist fyri 750 kr. (nýprísur 1400,-) v/ fótbremsu.
Tlf. 220272/316036

SKUTARI TIL SØLU
4-5 mðr. gamal, koyrt 1.000 km, koyrir væl.
Tlf. 261373

MOTORSÚKKLA
Honda CB 400 cc til sølu.
Tlf. 255305 ella 283996

TIL SØLU
Dreingjasúkkla til 4-6 ár.
Tlf. 448417

Teldur

SUBWOOFER
600 watt og ein forsterkari 1 x 800 – 2 x 400 watt til sølu.
Tlf. 423447

PLAYSTATION TIL SØLU
við einum joystikki og tvey memorykort, 18 og 24 megabite og teldan hevur chip í og 6 spøl, alt fyri 2.000 kr.
Tlf. 224069

TELDUSKERMUR
Dell 771 P, 17" lítið brúktur til sølu fyri 1500 kr. Nýprísur 2.625.
Tlf. 212027

SPØL TIL SØLU
Nintendo 64 spøl – Mission Impossible, Aero-Gage fyri 250 kr. South park og Revolt fyri 300 kr. Zelda, Lamborghini, Lylatwars fyri 350 kr.
Tlf. 316580 ella 253389

NINTENDO 64
við tveimum joystikkum og rumbulpack til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 316580 ella 253389

NINTENDO 64 TIL SØLU
Nintendo 64 við 2 joystikkum og fýra spølum til sølu fyri 1500 kr.
Tlf. 328138

Tónleikur

SURROUND
stereoanlegg av merkinum Kenwood til sølu– við fylgir Dali hátalarar og DVD spælari við kann spæla CD og MP3 filar – fyri 10.000 kr. Nýprísur 20.000 kr.
Tlf. 212717

STEREOANLEGG
Eitt svart Pioneer DC-Z83 2 x 75 watt við dup. cd-spælara, radio. bandupptakara (dup.) og grafiskum equalizara til sølu fyri 3.000 kr. Nýprísur 8-9.000 kr.
Tlf. 315474

HÚS TIL SØLU

Mál nr. 177
Adr. Fagralíð 6, 100 Tórshavn
Stødd á sethúsum: 88 m² x 2 + loft, hjall og garagu
Stødd á grundøki: 337 m²
Byggiár: 1972
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

Mál nr. 228
Adr. Rygsgøta 6, Hamarin, 160 Argir
Stødd á sethúsum: 120 m² í tveimum hæddum
Stødd á grundøki: 500 m²
Byggiár: 1993
Kostnaður: Ynskja kr. 1.800.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 229
Adr. A. C. Evensensgøta 1, 100 Tórshavn
Stødd á sethúsum: Uml. 85 m² x 3 og 100 m² x 2
Byggiár: 1948
Kostnaður: Kr. 3.000.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 230
Adr. Trapputún 1, 100 Tórshavn
Stødd á sethúsum: 112 m² x 2 + bilhús
Stødd á grundøki: 586 m²
Byggiár: 1962
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

Mál nr. 231
Adr. 388 Mykines
Stødd á sethúsum: Uml. 120 m² í trimum hæddum
Stødd á grundøki: 87 m²
Byggiár: Eldri sethús
Kostnaður: Kr. 500.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 232
Adr. Grønlandsvegur 50, 100 Tórshavn
Stødd á sethúsum: 204 m² í trimum hæddum við útbygningi
Stødd á grundøki: 777 m²
Byggiár: Uml. 1950
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

Mál nr. 234
Adr. Landavegur 7, 100 Tórshavn
Stødd á sethúsum: Uml. 100 m² í tveimum hæddum + loft
Stødd á grundøki: Uml. 100 m²
Byggiár: 1900
Kostnaður: Hóskandi boð

Mál nr. 235
Adr. J. C. Svabosgøta 48, 100 Tórshavn
Stødd á sethúsum: 63 m² x 3 + garagu
Stødd á grundøki: 202 m²
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

Mál nr. 237
Adr. Berjabrekka 45, 100 Tórshavn
Stødd á sethúsum: 118 m² + hjall og súkkluskúr
Stødd á grundøki:
Kostnaður: Kr. 1.200.000,- ella hægsta boð yvir

Ætla tygum at selja ella keypa hús, vilja vit fegin hjálpa tygum

GRUNDØKI OG JØRÐ

Mál nr. 545
Adr.: Rasmussargerði, Skála
Vídd á grundøki: 1478 m²
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

Mál nr. 547
Adr.: J. C. Svabosgøta 25, 100 Tórshavn
Vídd á grundøki: 508 m² við ástandandi úthúsi
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

Mál nr. 549
Adr. Grønlandsvegur 50, 100 Tórshavn
Vídd á grundøki: 600 m²
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

Vit hava eisini onnur sethús, sum ikki eru lýst í blaðnum. Støkk inn á gólvið.

Húsamekling

Sp/f Protek, Vaglið, Postsmoga 331, 110 Tórshavn,
Tlf. 319321, Fax 319331, E-mail: protek@post.olivant.fo
www.husamekling.fo
Avgreiðsla kl. 9-12 og 13-16

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

- ❑ Akfør
- ❑ Barnaansing
- ❑ Bingo
- ❑ Býli
- ❑ Dýr
- ❑ Innbúgv
- ❑ Matur
- ❑ Súklur
- ❑ Út-& sjónvarp
- ❑ Amboð
- ❑ Barnaútgerð
- ❑ Brævaskifti
- ❑ Bøkur
- ❑ Fundir
- ❑ Lutaseðlar
- ❑ Pløgg
- ❑ Teldur
- ❑ Ymiskt
- ❑ Arbeiði
- ❑ Bátaútgerð
- ❑ Burturm./funnið
- ❑ Dansur
- ❑ Húsarhaldstól
- ❑ Leikur
- ❑ Samband
- ❑ Tónleikur
- ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……...

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frimerki